## UTTAN ÚR HEIMI

# Falskir løgreglumenn í Keypmannahavn

**Útlendsk ferðafólk í Keypmannahavn verða steðgað av monnum, sum siga seg vera løgreglumenn, men sum vísa seg at vera tjóvar**

DANMARK
*Árni Joensen*

Seinasta vikuskiftið steðgaðu tríggir menn einum japanskum hjúnum á einari gøtu í Keypmannahavn. Menninir søgdu seg vera løgreglumenn, og ein teirra vísti fram eina silvurlitta stjørnu. Japansku ferðafólkini ivaðust sum vera man ikki í, at menninir vóru løgreglumenn og lótu teir kanna taskurnar, sum tey høvdu. Tá teir tríggir menninir vóru farnir, varnaðust japansku hjúnini, at evrur, dollarar og yen fyri 11.000 krónur vóru horvin.

Í einum øðrum føri steðgaðu nakrir menn einum indiskum pari. Ein teirra spurdi, um indiski maðurin kundi taka eina mynd av sær fyri seg. Um somu tíð komu tveir aðrir menn hagar. Teir søgdu seg vera løgreglumenn og spurdu, um indisku ferðafólkini høvdu rúsevni í taskunum. Ein av monnunum vísti eitt skelti fram. Tá indiska parið fekk taskurnar aftur, vóru 700 dollarar horvnir.

So møtir tú einum manni ella einari kvinnu í Keypmannahavn, sum sigur seg vera úr løgregluni, so er tað ikki vist, at tað er so. Men tað ber til at biðja um at sleppa at síggja samleikaprógvið, sum tey røtti løgreglufólkini hava.

# Hvítir løgreglumenn ákærdir fyri harðskap ímóti svørtum unglingi



*Løgreglumaðurin Jeremy Morse í rættinum í Inglewood hósdagin, tá hann varð formliga ákærdur fyri óneyðugan harðskap*
*Mynd: Reuters*

**Tveir hvítir løgreglumenn í Los Angeles eru nú ákærdir fyri at hava bukað og sligið ein svartan ungling, eftir at teir fyrst høvdu lagt hann í hondjørn**

USA
*Árni Joensen*

Tilburðurin, sum var í Los Angeles-forstaðnum Inglewood, varð tikin upp á sjónband, og myndirnar eru síðani vístar í sjónvarpi um allan heim.

Annar løgreglumaðurin, Jeremy Morse, er ákærdur fyri at hava lagt á tann 16 ára gamla svarta Donovan Jackson við óneyðugum harðskapi og at hava sligið hann í andlitið. Ein starvsfelagi hansara er ákærdur fyri at hava falsað frágreiðingina um tað, sum hendi. Báðir løgreglumenninir siga seg vera ósekar.

Verður tann 24 ára gamli Jeremy Morse dømdur sekur, kann hann fáa trý ára fongsul og 70.000 krónur í bót. Hann er fyribils loystur úr starvinum, men fær kortini fulla løn.

Tilburðurin í Inglewood hevur fingið øði í tað svarta fólkið í býarpartinum, og seinastu dagarnar hava tey fleiri ferðir skipað fyri mótmælum ímóti løgregluni, sum verður løgd undir at vera rasistisk.

Umframt løgregluna í Los Angeles kanna amerikansku landsmyndugleikarnir eisini tilburðin í Inglewood. M. a. hevur løgmálaráðið í Washington sett fólk at kanna málið.

# Pápi Silviu drotning var nazistur

**Pápi svensku drotningina var limur í týska nazistaflokkinum**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*

Svenska drotningin er fødd í Týsklandi, og nú avdúkar blaðið Arbetaren, at pápi hennara, Walter Sommerlath, gjørdist limur í nazistaflokkinum í 1934. Walter Sommerlath búði tá í Brasil, men hann flutti aftur til Týsklands í 1937. Tá vóru nazistarnir komnir til valdið.

Svenska blaðið hevur funnið navn hansara í limalistanum hjá nazistaflokkinum. Har sæst, at hann hevur endurnýggjað limaskapin tvær ferðir, men tað sæst ikki, um ella nær hann fór burtur úr flokkinum. Walter Sommerlath, sum doyði í 1990, avsannaði í einari samrøðu í 1976, at hann hevði verið limur í nazistaflokkinum.

Svenska blaðið Aftonbladet skrivar, at Silvia drotning varð kunnað um greinina í Arbetaren, áðrenn blaðið kom út. Kongshúsið hevur ikki gjørt nakrar beinleiðis viðmerkingar til grenina, men ein talsmaður hjá kongshúsinum segði hósdagin, at Walter Sommerlath hevur ongantíð verið partur av svenska kongshúsinum.

# ítróttur

Nr. 137 • leygardagur • 20. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Anders Rasmussen vann í Eysturoynni



*Danir hava verið einaráðandi í Statoil Kring Føroyar higartil. Hósdagin áttu øll trý plássini á skamlinum*



*Eli Christiansen og Sverri Mohr Edvinsson vóru næstu føroyingarnir á mál, eftir Gunnar Dahl Olsen*

**Besti føroyingur gjørdist aftur Gunnar Dahl-Olsen, sum var fimtur í røðini**

STATOIL KRING FØROYAR
*Páll Holm Johannesen*

Eftir fyrstu etapu í Statoil Kring Føroyar, er greitt, at 41-ára gamli danin, Anders Rasmussen nú er á odda í samanløgdu støðuni. Anders varð fyrstur á máli í Runavík hósdagin, og er nú 12 sekund frammanfyri vinnaran mikudagin, Karsten Ellerup.

### Fimm drógu frá

Allir súkklararnir fylgdust úr Havn til Kollafjarðar, har teir yngstu vórðu teir fyrstu, ið blivu settir av.

Tá komið var til Eiðisskarð var ein flokkur av 20 súkklarum, og á sjálvum skarðinum drógu fimm súkklarar frá. Ongin føroyingur var við í hesum fimm-mannaflokki.

Teir fimm súkklarnir, Anders Rasmussen, Karsten Ellerup, Leon Vibholm, Kenn Holmqvist og Richard Jones fylgdust til Gøtueiði, har so maðurin frá Ynes Mon, Richard Jones misti, og endaði í flokkinum aftanfyri.

Í flokkinum, aftanfyri teir fýra fremstu, vóru eini 10 súkklarar, har Gunnar Dahl-Olsen var einasta føroyska umboðið. Eitt sindur longri aftanfyri, vóru Sverri Mohr Edvinsson og Eli Christiansen at finna.

### Anders Rasmussen fór frá hinum

Fýra teir fremstu súkklarnir arbeiddu væl saman, har teir skiftust at halda ferð. Tá góðir 15 kilometrar írestaðu, gjørdi Anders Rasmussen eina roynd at sleppa frá hinum, men hon miseydnaðist.

Løtu seinni royndi Anders aftur, og hesaferð gekk betri. Anders fekk við undankoyingini eina fjarstøðu uppá góðan hálvan minutt niður til hinar. Teir tríggjir, Karsten Ellerup, Leon Vibholm og Kenn Holmqvist, megnaðu ikki at arbeiða so væl saman. Hetta komst av, at teir høvdu sera torført við at halda somu ferð.

Komnir um Agnið, gjørdi Karsten Ellerup eina roynd at fáa fatur í Anders Rasmussen aftur, men tað náddi hann ikki, hóast hann vann eini 15 sekund inná á Anders Rasmussen.

### Gunnar aftur besti føroyingur

Gunnar Dahl gjørdist aftur besti føroyingurin hósdagin. Hann kom á mál á fimta plássi, og er nú dottin niður frá triðja til fimta pláss í samanlagdu støðuni.

Gunnar var í flokkinum aftanfyri teir fremstu súkklararnar, og kom á mál góðar fimm minuttir eftir Anders Rasmussen. Flokkurin, sum Gunnar var í, taldi fimm súkklarar, og allir komu á málið við somu tíð.

Næstu føroyingarnir vóru Sverri Mohr Edvinsson og Eli Christiansen, ið komu á mál á vikavist 12- og 14 plássi. Í samlaðu støðuni er teir eisini 12- og 14 plássi.

| Nr. | Rygg Nr. | Navn | Felag | Aldur | Tíð | samlað støða | samlað tíð |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 6 | Anders Rasmussen | Lyngby CC | 41 | 2:47:36 | 1 | 02.58.38 |
| 2 | 1 | Karsten Ellerup | Vejle CK | 23 | 2:47:52 | 2 | 02.58.50 |
| 3 | 2 | Leon Vibholm | HAC | 29 | 2:48:36 | 3 | 03.00.03 |
| 4 | 7 | Kenn Holmquist Olsen | TCR | 32 | 2:48:54 | 4 | 03.00.31 |
| 5 | 5 | Gunnar D. Olsen | Tórshavnar Súkklufelag | 37 | 2:52:10 | 5 | 03.03.33 |
| 6 | 9 | Christian Brandt | Amager C R | 31 | 2:52:10 | 8 | 03.03.46 |
| 7 | 4 | Morten Truelsen | Fix Rødovre | 19 | 2:52:10 | 9 | 03.03.48 |
| 8 | 16 | Johan Reis | Amager C R | 28 | 2:52:10 | 6 | 03.04.08 |
| 9 | 3 | Richard Jones | Ynes Mon | 33 | 2:52:10 | 7 | 03.04.16 |
| 10 | 15 | Henrik Guldager Knudsen | Viborg MTB Klub | 22 | 2:53:36 | 10 | 03.05.36 |
| 11 | 17 | Stephan Phillip | Vejle CK | 20 | 2:58:28 | 11 | 03.10.05 |
| 12 | 12 | Sverri M. Edvinsson | Tórshavnar Súkklufelag | 36 | 3:02:37 | 12 | 03.14.04 |
| 13 | 8 | Kenneth Ellefsen | Tórshavnar Súkklufelag | 31 | 3:02:37 | 13 | 03.14.23 |
| 14 | 14 | Eli Christiansen | Tórshavnar Súkklufelag | 17 | 3:04:27 | 14 | 03.16.38 |
| 15 | 13 | David Thomas | Ynes Mon | 35 | 3:11:10 | 15 | 03.22.53 |
| 16 | 22 | Jens Sigurd Simonsen | Tórshavnar Súkklufelag | 20 | 3:15:50 | 17 | 03.28.49 |
| 17 | 19 | Arwel Jones | Ynes Mon | 34 | 3:16:46 | 16 | 03.29.04 |
| 18 | 20 | Beinir Rasmussen | Tórshavnar Súkklufelag | 29 | 3:17:07 | 18 | 03.29.20 |
| 19 | 27 | Allan Søndergaard | Hammel Cykel Klub | 55 | 3:22:07 | 19 | 03.35.10 |
| 20 | 11 | Dave Williams | Ynes Mon | 35 | 3:25:22 | 20 | 03.37.58 |
| 21 | 21 | Gareth Blackshaw | Ynes Mon | 23 | 3:27:05 | 21 | 03.38.58 |
| 22 | 24 | Keith Thompson | Ynes Mon | 54 | 3:27:05 | 22 | 03.40.01 |
| 23 | 10 | Aiden Bradley | Ynes Mon | 20 | 3:29:09 | 23 | 03.41.17 |
| 24 | 26 | John Barry Williams | Ynes Mon | 50 | 3:29:14 | 24 | 03.41.58 |
| 25 | 23 | Christian Guttesen | Tórshavnar Súkklufelag | 23 | 3:39:51 | 25 | 03.52.13 |
| 26 | 18 | Esmar Joensen | Tórshavnar Súkklufelag | 27 | 3:44:25 | 26 | 03.57.29 |
| 27 | 25 | Evald Rasmussen | Tórshavnar Súkklufelag | 45 | 4:03:32 | 27 | 04.17.20 |
| 28 | 29 | Hans Krosstein | Tórshavnar Súkklufelag | 14 | 4:04:22 | 28 | 04.17.39 |
| 29 | 28 | Danjal Michaelsen | Tórshavnar Súkklufelag | 15 | 4:06:09 | 29 | 04.19.48 |
| 30 | 31 | Robert Vilhelmsen | Tórshavnar Súkklufelag | 50 | 4:09:57 | 31 | 04.35.44 |
| 31 | 30 | Bergur Johansen | Tórshavnar Súkklufelag | 13 | 4:20:18 | | |
| **Ikki gjøgnumført** | | | | | | | |
| 32 | | Geyr Gilssteinsson | Ikki møttur til start | | | | |
| 33 | | Páll Didriksen | Súkklubrek | | | | |